

# Ársins Songrødd eitur Jóannes Lamhauge

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

**Jóannes Lamhauge vann leygarkvøldið finaluna í Ársins Songrødd í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, tá hann bergtók áhoyrarar og dómarar við síni framúr góðu tolking av "When you say you love me" hjá Josh Groban. Her var talan um eina sangrødd í heimsflokki og um eina sjálvsikra og fangandi framførslu. Jóannes hevði allan salin í sínum lógva og vísti ótrúliga góða innliving.**

Fimm songrøddir kappaðust í finaluni, seks høvdu vunnið sær veg í finaluna. Men vinnarin av fyrsta innleiðandi umfarinum Nikolina M. Midjord var burturstødd. Hetta var óheppið fyri kappingina, tí unga fuglafjarðagentan hevur eina sera góða rødd. Men finalan gjørdist tó ein frálík uppliving. Allar fimm songrøddirnar vóru á høgum støði, og ivaleyst fara vit at hoyra nógv til fleiri av teimum í framtíðini.

Eydna av Fløtum, sum vann seinna innleiðandi umfarðið, sang "I have nothing" hjá Whitney Houston, ein krevjandi sangur. Eydna megnaði uppgávuna og vísti, at hon uttan trupulleikar kundi borðið heiðurin sum ársins songrødd, hevði tað ikki verið tí, at hon í finaluni møtti so harðari kapping frá Jóannesi. Unga havnagentan var trygg á pallinum, og hevði ótrúliga sterka útstráling. Framførslan var ordiliga góð, og hon var á einum tryggum øðrum plássi.

Fyrsta sangarinnan á pallin var Hedavík N. Jespersen. Røddin hjá Hedavík er sera egin, rættuliga myrk og sera sjarmerandi, hon hevur øðiliga góðan klang og syngur væl. Lagið hon sang var "My love is your love". Men innlivingin í framførsluna var lítil og eingin. Henni tyktist slettis ikki at dáma at standa á pallinum, og tann manglandi innlivingin smittaði áskoðararnar, sum tyktust líkaglaðir. Hetta er ein spennandi songrødd, sum við eitt sindur av arbeiði kann gerast heilt góð.

Hilda Kjølbro av Viðareiði var við sínum 29 árum, tann elsti luttakarin í finaluni. Hon sang Titanic lagið "My heart will go on" hjá Celin Dion. Sangurin er avbjóðandi, og Hilda sang hann væl. Sangurin hóskaði tó ikki serliga væl til hennara rødd, sum ikki veruliga kom til sín rætt. Í innleiðandi umfarinum sang hon "Crazy" hjá Patsy Cline. Tá vísti Hilda, at hon hevur ein lekran kontriklang í røddini. Men í ýlipoppinum hjá Celine tyktist røddin strongd.

Evi Hallsdóttir úr Søldarfirði var eins og hinir luttakararnir hetta kvøldið ein góð songrødd. Í fyrsta innleiðandi umfarinum var Evi sera góð, tá hon sang "Don't you know why" hjá Norah Jones. Til finaluna hevði Evi valt at skifta lag, og hetta vísti seg at vera eitt mistak. "Mær leingist", sum Nikolina við Kamarinum og Eivør Pállsdóttir meistarliga hava tolkað, var ein ov stórur biti at gloypa hjá Evi. Hóast Evi sá út til at meina tað og hevði eina frálíka pallframførslu, kravdi lagið meira enn røddin hjá Evi hevði. Tað var ikki altíð heilt reint sungið, og røddin var ikki nóg egin til hetta lagið.

Tað var eingin ivið um at Jóannes var bestur og at Eydna var næst best. Jóannes er ein so góður sangari, at hann hevur møguleika, at gerast ein enn størri stjørna. Hann kann soleiðis traðka í fótasporini hjá fyrrverandi vinnarunum í Ársins Songrødd: Eivør Pállsdóttir, Malan Eyðunsdóttir, James Olsen, Guðrun Sólja Jacobsen og Sólva Ford.


**Havnar Bio**

kall Coca-Cola




**Bøllebob og Smukke Sally**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 18.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Týsdag | 19.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 17.00 | kl. 19.00 |




**Hostage**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadag | 18.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |
| Týsdag | 19.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 21.00 | kl.23.15 |




**War of the Worlds**

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 18.07 | kl. 19.30 |
| Týsdag | 19.07 | kl. 19.30 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 19.30 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 19.30 |

*Seinasta sýning*




**Sahara**

| | | |
|---|---|---|
| Mánadag | 18.07 | kl. 22.15 |
| Týsdag | 19.07 | kl. 22.15 |
| Mikudag | 20.07 | kl. 22.15 |
| Hósdag | 21.07 | kl. 22.15 |

**Komandi filmar**




**Batman Begins** *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 22.07




**A Lot Like Love** *FRUMSÝNING*

Fríggjadag 22.07

**www.bio.fo • Telefon 31 19 56**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**